## Reyð tøl á botnlinju

Altjóða sambandið fyri frælsan ítrótt, IAAF, stríðist fyri at fáa endarnar at røkka saman, men tað gongur ikki so væl. Nú finnast fleiri at felagsskapinum, tí ov long tíð er gingin, áðrenn nakar hevur traðkað á bremsuna. Teirra millum er formaðurin í norska sambandinum fyri frælsan ítrótt, Svein Arne Hansen: – Tað bendir ikki á góða fíggjarrøkt, at einki hendir fyrr enn nú, sigur hann.




## Tevez í evstu løtu

Manchester City vann í gjárkvøldið í Premier League í evstu løtu á Wigan í einum dysti, sum annars sá út til at skula enda málleysur. Ikki fyrr enn Wigan 18 minuttir fyri tíð fekk ein mann útvístan, vaknaði City og endaði við at vinna 3-0. Tað var Carlos Tevez, ið skjeyt øll trý málini, ið komu eftir bara 13 minuttum.

# á Hálsi


















